# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*




*Her er ein tekning, sum mentamálanevndin hjá býráðnum bað J.P. Gregoriussen tekna, sum eitt uppskot um, hvussu økið kundi koma at síggja út, um Perlan ikki var bygd upp aftur*

Fyri 25 árum síðan:

# Havnarfólk ynsktu ikki nýggja Perlu

Í Sosialinum tann 21. januar 1984 er ein grein um økið í Vágsbotni, har sum matstovan Perlan stóð. Havnarfólk ynsktu eftir øllum at døma ikki, at byggjast skuldi aftur á økið.

Matstovan og gistingarhúsið Perlan læt á fyrsta sinni upp í 1942. Tað var Gunnar Olsen sum byrjaði virksemið har, men longu árið efir tók Poul Rasmussen yvir.

Í 1945 keypti Conrad Skaale bygningin og helt fram við matstovuni og gistingarhúsinum. Conrad Skaale seldi Tórshavnar kommunu bygningin í 1957. Tá leigaði Eyvind Binderup bygningin til matstovu. Frá 1964 til 1972 rak Jógvan Samuelsen Perluna. Eftir tað var Perlan brúkt sum spælistað hjá ymiskum orkestrum.

Tá Perlan varð tikin niður, samtykti býráðið at Perlan kundi fara, um annað hús varð bygt har ístaðin. Býráðið hevði eisini fingið teknaða nýggja Perlu, sum eftir ætlan skuldi kosta umleið 1,3 milliónir krónur.

Heðin Mortensen, formaður í mantamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, sigur við blaðið at uppskotini um hvat skal gerast á økinum, har sum Perlan stóð, vórðu almannakunngjørd herfyri og nógv fólk høvdu sagt sína meining um hetta málið. Men líkt var til, at havnarborgarar ikki ynsktu at nakað varð bygt har ístaðin. Fólk vóru samd um, at nú Perlan er burtur, koma kirkjan og bygningarnir á Bryggjubakka veruliga til sín rætt.




*Tá Perlan varð tikin niður, ynsktu havnarborgarar ikki, at nakað varð bygt har ístaðin*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elsabeth Bjarnason** fer til gravar úr Fossvogs-kapell í Reykjavík hósdagin 22. januar klokkan 13.

**Rigmor Thomsen**, Norðragøtu, andaðist í Slagelse sunnudagin 18. januar, 86 ára gomul.

Leygardagin andaðist á Landssjúkrahúsinum, **Henny Jensen** úr Kvívík, 86 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju mikudagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey ið ynskja at senda eina heilsan, kunnu lata Kvívíkar kirkju eina gávu.

**Herborg Olsen** á Argjaboða, ættað úr Leirvík, andaðist á heiminum í Vallalíð sunnudagin 89 ára gomul. Kistan fer av Vallalíð týsdagin kl.15. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju mikudagin kl.13. Tey, ið vilja minnast Herborg kunnu lata heiminum í Vallalíð eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Elma Bech**, ættað úr Porkeri, andaðist sunnudagin á Slagelse sjúkrahúsi, 81 ára gomul.

## Dagurin

**20. januar. Brøðramessa**. Hildin til minnis um teir báðar Fabianus og Sebastianus. Teir eru ikki brøður, men vórðu fyri trúar sakir tiknir av døgum sama dag í árinum, Fabanus, sum var pávi, umleið ár 250, og Sebastianus – kristin hermaður – umleið ár 288. Tað sigst, at teir báðir eru jarðaðir undir tí núverandi kirkjuni San Sebastian í Róm. Fabianus er rómverskt ættarnavn. Sebastianus er upprunaliga grikst navn, ið merkir *heiðurverdur*.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum
á ymiskan hátt gleddu okkum
á gullbrúdleypsdegnum 20. desember.
Somuleiðis ynskja vit øllum
eitt gott nýggjár.

**Anton og Mathea Petersen, Sandur**

Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo